

# Fimm tær bestu fløgurnar í mínum fløgusavni

**Jákup Zachariassen, tónleikari, framleiðari og grafikkari**

Niels Uni Dam,
nielsuni@sosialurin.fo

Jákup Zachariassen er tann føroyingurin, ið hevur gjørt mest fyri at skapa sambond ímillum kristna og verðsliga tónleikapallin í Føroyum. Áðrenn hann byrjaði sítt arbeiði, var talan at kalla um tveir føroyskar tónleikapallar, har næstan einki samstarv var ímillum. Nú spæla kristnir bólkar á Ólavsøkukonsertini og G! Festivalinum. Tónleikarar av verðsliga pallinum spæla við á fløgum og konsertum hjá kristnum solistum og bólkum og umvent.

Sum eigari av Jak Zak Studio hevur Jákup bæði virkað sum tónleikari og framleiðari á hópin av fløgum. Gittarin og kanska serliga steel-gittarin er tað hann er best kendur fyri, og hevur ein føroyskur bólkur brúk fyri einum steel-gitara á fløgu ella konsert, so er tað vanliga Jákup ringt verður til. Hann hevur t.d. spælt á nýggjum fløgum sum t.d. hjá Knút Háberg Eysturstein og Deja Vu.

## Góðska er varumerkið

Jákup er eisini grafikkari, hann hevur sett á stovn eitt tað størsta føroyska lýsingarvirkið Repro-Z, og arbeiðir enn á tí. Í løtuni tó einans hálva tíð, tí restina av degnum brúkar hann til tónleik. Jákup gjørdist víðagitin í Føroyum, tá hann var høvuðsmaður og skrivaði tónleikin í kristna bólkinum Ichtus. Hetta var ein fløga, ið setti nýggjan standard innan góðsku í kristnum føroyskum tónleiki.

Bæði í grafiska virkseminum og í tónleikinum er tað høg góðskukrøv, ið merkja arbeiðið hjá Jákupi. Her tala útgávur sum tann víðagitna Jólafløgan og nýggjasta fløgan hjá Ólavi Højgaard fyri seg sjálvar.

## Bestu fløgurnar

Planet.fo hevur biðið Jákup Zachariassen um, at valt tær fimm fløgurnar úr hansara fløgusavni, ið honum dámar allarbest.

Jákup greiður frá, at tað er heildin, sum ger eina fløgu ordiliga góða. Men hann leggur fyrst og fremst dent á, at løg og tekstir eru góð - At tey onkursvegna nema hann. Hetta er tað mest týdningarmikla. Men so skal fløgan helst vera vælspæld og ljóða væl. Men hetta er ikki líka týdningarmikið sum góðskan á løgunum. "Ein góð fløga fær meg at føla meg væl", sigur hann.

Hann viðgongur, at tað altíð er eitt sindur skiftandi hvørjar fløgur honum dámar best. Men tá hann hyggur aftur eftir, so hava hesar fimm útgávurnar havt stóran týdning. Tær hava sagt honum mest gjøgnum tíðirnar, og eru ferð eftir ferð endaðar aftur í fløguspælaranum ella undir nálini á plátuspælaranum.

## Donald Fagan - The Nightfly




Hetta er solofløga hjá Donald Fagan, ið er best kendur, sum høvuðsmaðurin í Steely Dan. Fløgan er fantastiska góð. Hon er flott prodsera og ljóðar ordiliga væl. Eg havi gjøgnum tíðirnar keypt mær fleiri eintøk av henni. Øll løgini eru góð, og tað er nokkso sjálvsamt á eini fløgu. Hon hevur sagt mær ordiliga nógv, og tí havi eg eisini lurtað nógv eftir henni. Hon er eitt sindur jassutt og eitt sindur West Coast, hetta er nokkso progressivur tónleikur. Arrangementini eru eisini slóðbrótandi.

## Larry Carlton - Sleepwalk




Hetta er ein instrumental plata, ið var mín yndisplata, tá eg byrjaði at spæla gittar. Hetta er stutt sagt ein praktfull pláta, sum segði mær ordiliga nógv. Eg royndi at spæla afturvið henni. Hetta er eitt slag av jassrokki. Mær hevur altíð dámt væl jass og West Coast, hóast eg kanska er mest kendur fyri kontri. Hendan plátan er nokkso easy listening.

## Alison Krauss - Forget about it




Eg keypti Alison Krauss fløguna í 2000 í París. Teitur Lassen hevði skotið upp, at eg keypti okkurt við henni. Tá eg so sá fløguna, keypti eg hana og fall pladask. Alla vikuna í París lurtaði eg eftir henni. Hon spælir Bluegrass kendan kontri tónleik. Mær dámar væl mátan hon syngur, og hennara inniligu tekstir. Ja, hon virkar innilig og erlig øll sum hon er.

Tað ger ikki fløguna verri, at Jerry Douglas ein dobro-gittarleikari, sum eg dyrki nógv spælir við og hevur produsera fløguna.

## Airplay - Airplay




Hetta er ein LP-pláta, sum tveir øgiliga góðir produsarar David Foster og Jay Graydon hava gjørt saman. Teir vóru báðir produsarar hjá Earth Wind and Fire, og fleiri Earth Wind and Fire løg eru á plátuni. Hendan plátan definerar hvat West Coast er, men við einum lítlum ísletti av rokki. Umframt at vera góðir produsarar eru teir báðir ordiliga góðir tónleikarar. Hetta er væl produsera, væl spælt og løgini eru góð.

## Richard Page - Shelter Me




Richard Page er ein maður, sum hevur gjørt nógv. Hann byrjaði við bólkinum Pages í 70-80'unum, har hann var høvuðsmaður. Í 80'unum var hann høvuðsmaður í Mr. Mister. Í 90'unum kom so fyrsta solofløgan. Hetta er ein feit fløga, eitt sindur singer/songwriter kend, og eitt sindur West Coast. Eg haldi tað eru serliga løgini og tekstirnir, sum eru góðir á hesi fløguni, ja, og so sjálvandi eisini mátin hann syngur.